# Jóansøka í dýrdarveðri

**Jóansøkan 2008 í Vági fór framvið í dýrdarveðri, og sum myndirnar vísa, var nógv á skránni til bæði stór og smá**

JÓANSØKA

*Myndir; Jóhannus Andreasen/Dagfinn Olsen*
*Lagt tilrættis; Dagfinn Olsen*

Mest av øllum var jóansøkan í Vági merkt av dýrdarveðri og nógvum stevnugestum. Serliga leygardagin vitjaðu nógv fólk, tí nógv var á skránni, har fólk úr øllum landinum tóku lut, so sum kappróður, renning og fótbóltsdystir.

Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, setti jóansøkuna. Svenn Olsen, vágbingur og útiseti, helt midnáttarrøðu.

Sum útvarpsverturin helt fyri í beinleiðisfrásøgn síni, so kom ikki ofta fyri, at so skjótt er at avgreiða allar róðrarnar, sum tað var á jóansøku í ár, og veðrið kundi heldur ikki verið betri til kappróður.

Smyril – hesin ríari gestur á Vágsfirði – fylti væl í myndini, og Salka Valka, ið nú hevur norskan eigara, vitjaði eisini við bryggju.

Nógv var til bæði stór og smá, og eittnú var stórfingin sýning við Garðabrúgv, tá Suðuroyar Sunnara Bjargingarfelag vísti fram bjargingarúrgerð, og ikki minst vísti fram nýggja bjargingarbátin Lív, sum Havnar Bjargingarfelag eigur.

Vit lata myndirnar tala fyri seg.












